# Vendið flokkunum bakið til bý- og bygdarráðsval!

THOMAS ARABO



Í teimum størru kommununum hava vit stillað flokspolitiskt upp til kommunuval. Hvat er endamálið við tí? Hvat hava Sambandsflokkurin og Tjóðveldi við kommunalpolitikk at gera? Samband við hvønn? Loysing frá hvørjum?

Onkur vil siga, at ymiskt í stevnuskráunum hjá flokkunum er relevant í kommunalum høpi. Fyri Tjóðveldi og Javnaðarflokkin, sum í dag ráða fyri borgum í Tórshavnar Kommunu, má hetta merkja sosial ábyrgd og umhvørvisábyrgd. Trupulleikin er bara tann, at hesir flokkar við Heðini Mortensen og Leivuri Hansen á odda ganga beint ímóti stevnuskráum floksins, uttan at tað fær nakrar avleiðingar.

Javnaðarflokkurin og Tjóðveldisflokkurin hava tilvitað noktað at gjørt eina umhvørvisárinskanning av størsta bingjuhavnsprojekti í landinum, hóast vit eru nógv sum hava biðið um hetta. Eg vil meina, at sambært galdandi havumhvørvislóg, er hetta krav. At nokta at gera eina umhvørvisárinskanning er eisini ein avgerð fullkomuliga í stríð við stevnuskrá og vanligt vit og skil. At Javnaðarflokkurin, sum eigur formannin í Umhvørvisnevndini hjá Tórshavnar Býráð, so roynir at kompensera við lítlum tiltøkum við vistfrøðisligum smyrsli, nyttar ikki nógv, tá man blankt noktar at kanna umhvørvisárin av einari bingjuhavn, sum púra ábyrgdarleyst frá einum umhvørvissjónarmiði og sosialum sjónarmiði verður kroyst millum hús innast í einum firði. Umhvørvistiltøkini hjá Elin Lindenskov í Tórshavnar Býráð, sum eisini atkvøddi fyri at gera eina bingjuhavn uttan umhvørvisárinskanning, eru sum at royna at bøta um støðuna á einum søkkandi Titanic við at hampa um dekkstólarnar.

Javnaðarpolitikkur er ikki at venda sær frá umhvørvisvandalismu, men at standa sum garantur móti henni. Tað hevur Javnaðarflokkurin í Tórshavnar Býráð ikki livað upp til. Hvat nyttar tað at atkvøða fyri tí, sum Elin Lindenskov og stevnuskráin sigur, tá íð tað er Heðin Mortensen og hansara umhvørvispolitikkur, ella mangul upp á sama, sum dikterar gongdina uttan fyri ringvegin í Havn?

Heldur ikki Tjóðveldi hevur nakað at vera errin av á umhvørvisfrontinum. Tjóðveldi eigur formannin í Havnanevndini, Leivur Hansen, sum í stríð við byggisamtykt byrjaði eina bingjuhavn á einum vinnuøki. Hetta bíða vit mong framvegis eftir, at Tórshavnar Kommuna skal setast upp á pláss fyri. Kanska onkur fjølmiðil fer at biða um alment innlit hjá Løgmansskrivstovuni og Løgmálaráðnum um hetta, so almenningurin sær, hvussu umsitið hevur verið í stríð við galdandi lóg, uttan at nakar – enn – hevur tikið nakra avleiðing av hesum. Leivur Hansen noktaði eisini blankt at gera eina umhvørvisárinskanning, uttan at hetta upp á nakran máta bleiv átalað frá floksins síðu. Um umhvørvispolitikkurin er burtur í býráðspolitikkinum hjá Tjóðveldi, so er floksins frammanundan spinkla endamál at stilla upp til kommunuval burtur.

Veljarar, sum atkvøða flokspolitiskt til kommunuval eru bara atkvøðuneyt hjá einstaklingum sum Leivur Hansen og Heðin Mortensen, sum ikki kenna eina stevnuskrá frá telefonbókini.

Eg eri tí komin til ta niðurstøðu, at rætti vegurin fram er at stilla borgaralistar upp til komandi býráðsval. Flokkarnir fylgja allíkavæl ikki sínum stevnuskráum í kommunalpolitikki.

Fólk mugu kunna fáa grundstykki í sínari heimbygd. Harafturat má eitt og hvørt nærumhvørvi tryggjast móti umhvørvisvandalismu, sum bingjuhavnsørskapurin hjá Tórshavnar Havn. Eitt slíkt øki, sum tað sum Tórshavnar Havn vil brúka sum bingjuhavn á Oyrareingjum, má setast av til onkran 9 til 5 vinnuaktivitet sum ger tað meiri liviligt í nærumhvørvinum, heldur enn at hava eitt stórt tómt øki fult av bingjum við tilhoyrandi larmi og dálking dag og nátt, sum fer at forkoma aldargomul búpláss og náttúru rundanum.

Hetta verður bert tryggjað við, at borgaralisti verður gjørdur. Eitt borgara- og umhvørvisvinarligt alternativ til floksumboðini, sum ikki fylgja stevnuskráum allíkavæl.

# Ríkisfelagsskapurin fram um seráhugamál hjá SF

EDMUND JOENSEN
løgtings- og fólkatingsmaður



Politikkurin hjá Ríkisfelagsskapinum í altjóða hvalaveiðunevndini, IWC, verður framvegis til fyrimuns fyri Føroyar og Grønland, hóast Socialistisk Folkeparti roynir at seta egin áhugamál fram um áhugamálini hjá samlaða Ríkisfelagsskapinum.

Áhugamálini hjá tí sameinda Ríkisfelagsskapinum viga meira í uttanríkispolitiskum samanheingi enn seráhugamálini hjá Socialistisk Folkeparti (SF). Tí fer danska stjórnin framhaldandi at umboða og verja føroysk og grønlendsk áhugamál í altjóða hvalaveiðunevndini, IWC.

Hetta er niðurstøðan hjá undirritaða fólkatingsmanni, eftir at SF í gjár alment róðið fram undir, at danska stjórnin skal skifta kós í hvalaveiðipolitikkinum hjá Ríkisfelagsskapinum.

Undirritaði hevur í dag havt samband við ymsar partar í politiska umhvørvinum á Christiansborg, og tann greiða ábendingin er, at stjórnin fer at halda somu politisku kós í IWC sum higartil. Tað merkir, at føroyska og grønlendska sjónarmiðið um, at hvalaveiða kann loyvast, tá hon fer fram á burðardyggum grundarlagi, framvegis er almenna sjónarmiðið hjá Ríkisfelagsskapinum í IWC.

Hetta verður eisini kjarnin í tí, sum danski uttanríkisráðharrin, Per Stig Møller, fer at greiða Steen Gade úr SF frá, tá samráð verður í umhvørvisnevndini hjá Fólkatinginum í morgin.

Sjónarmiðið hjá SF um, at Føroyar og Grønland eru minnilutar í danska ríkinum, og tí mugu lata sær lynda, at almenni danski IWC-politikkurin skal broytast, stríðir móti andanum í Ríkisfelagsskapinum.

# Bíblian innblást av Gudi - ikki mannaorð um Gud

RICHARD DANIELSEN



**27. partur**

Meðan Nahum profetur profeterar um assýrarnar, sum løgdu Ísraelsríki í oyði, profeterar næsti profeturin, Habakkuk, um kaldearar, sum løgdu Judaríki í oyði. Eisini her síggja vit Guds yvirstýrandi hond. Menniskju sleppa bara at gera tað, sum Gud loyvir. Í fyrsta kapitli sigur hann Soleiðis:

Tí Eg lati Kaldearar reisast, hitt grumma og raska fólkið, ið fer fram um alla jørðina at taka í ogn bústaðir, sum er ogn annara..

Ert Tú ikki frá fornum tíðum HARRIN Gud mín, heilagi mín! - Vit skulu ikki doyggja. HARRI! Til at fullføra dóm hevur Tú sett teir. Tú, klettur okkara! Til at revsa hevur Tú givið teimum vald. Kap. 1,6 og12.

Fyrsti kapitul er annars um, at kaldearar koma yvir landið. Profeturin gremur seg um støðuna og biður til Harran. Harrin svarar honum í kapitli tvey, og her síggja vit eitt dømi um, tá ið Harrin talar til profet:

Niðan á varða mín skal eg fara, og standa á vaktarstaði mínum; eg skal hyggja út og fáa at vita, hvat Hann fer at tala í mær, hvat svar eg fái uppá klagu mína.

Og HARRIN gav mær hesi orð til svar: Skriva upp sjónina - skriva hana skilliga á talvurnar, so hon er góð at lesa.

! Tí enn má sjónin bíða eftir tíð síni; men hon gongur við skundi móti endanum og lýgur ikki. Um hon so drálar, bíða eftir henni! Tí koma skal hon, tað skal ikki svitast.

Hástór og óærlig er sál hansara í honum - men hin rættvísi skal liva við trúgv síni. Kap. 2,1-4.

Hetta er undurfult. Hin rættvísi skal liva við trúgv síni. Og lyftið er, tað skal ikki svitast. Sjónin lýgur ikki. Viðhvørt kann tað vera leingi at bíða, men Harrin lýgur ikki. Eingin ið lítur á hann skal verða til skammar. Tey verða til skammar, sum uttan grund eru trúðleys.

Restin av øðrum kapitli er um dóm yvir synd, og triði kapitul er um dóm yvir jørðina..Hetta hava vit sæð aftur og aftur, nú vit hava gingið gjøgnum profetarnar, dómur bíðar heiminum. Men hin rættvísi skal liva, tað er troystin , vit eiga og hana átti Habakkuk eisini. Hann gleðir seg í Gudi sínum mitt í allari neyðini:

Tí fikutræið blómar ikki; víntræið ber ongan ávøkst; ávøkstur oljutræsins miseydnast; markirnar geva onga føði; seyðurin er horvin úr bólinum, og eingi neyt eru eftir í fjósunum.

- Men eg skal gleðast í HARRANUM, fegnast í Gudi frelsu mínar!

Harrin HARRIN er styrki mín; Hann ger føtur mínar sum hindanna og letur meg ganga eftir hæddum mínum. - Til songmeistaran. Við streingjaleiki mínum. Kap 3,17-19.

**Framhald**

# Føroysk og grønlendsk áhugamál í IWC væl vard

EDMUND JOENSEN
løgtingsmaður og fólkatingsmaður



Hóast ein meiriluti í Fólkatinginum tekur undir við hugskotinum um eitt hvalareservat í Suðurísharinum, eru áhugamálini hjá Føroyum og Grønlandi væl vard í mun til altjóða hvalaveiðunevndina IWC. Landsstýrismaðurin í uttanlandsmálum brúkar málið í síni flokspolitisku herferð móti Ríkisfelagsskapinum.

Umboð fyri ein meiriluta í Fólkatinginum hava í dag tikið undir við hugskotinum um eitt sonevnt hvalareservat í Suðurísharinum. Tað hendi á einum fundi í umhvørvisnevndini hjá Fólkatinginum fyrrapartin.

Hetta merkir, at danska stjórnin fer at atkvøða fyri hesum hugskoti, um tað sum uppskot kemur til atkvøðugreiðslu á fundi í altjóða hvalaveiðunevndini, IWC, í Chile í næstum.

Kortini er greitt, at føroysk og grønlendsk áhugamál framhaldandi eru væl vard.

Umhvørvisnevndin hevur nevniliga eisini tikið hesar avgerðir:

Strandalond skulu geva sítt samtykki til sonevnd hvalareservat

Hvalaveiða skal fara fram á vísundaligum grundarlagi

Hetta merkir, at Fólkatingið framvegis stuðlar Føroyum í rættinum at veiða hval og t.d. at drepa grind, sum jú fer fram á vísindaligum grundarlagi. Somuleiðis kunnu grønlendingar framhaldandi veiða stórhval, ið eisini fer fram á vísundaligum grundarlagi.

Hetta merkir eisini, at um tað nakrantíð skuldi komið hartil, at uppskot kemur um at gera eitt hvalareservat um okkara leiðir, so kunnu vit sum strandalond siga nei.

Henda loysn eigur at vera nøktandi fyri allar partar í Ríkisfelagsskapinum. Vert er at leggja til merkis, at hetta er fyrstu ferð, at allir flokkar í Fólkatinginum, uttan Ny Alliance, taka undir við, at hvalaveiða skal loyvast, um hon fer fram á vísindaligum grundarlagi.

Í tíðindasendingini í Útvarpi Føroya kl. 16.00 í dag varð landsstýrismaðurin í uttanlandsmálum, Høgni Hoydal, endurgivin fyri at siga, at "hetta málið vísir, hvussu ótolandi ríkisrættarliga støðan er".

Hetta er galin niðurstøða at gera.

Tvørturímóti vísir málið, at Ríkisfelagsskapurin fylgir við tíðini og framhaldandi er fult førur fyri at verja áhugamálini hjá Føroyum og Grønlandi.

Úttalilsið hjá Høgna Hoydal kemur sum liður í vanligu flokspolitisku herferðini hjá landsstýrismanninum móti Ríkisfelagsskapinum.